# The Isaacs



**Navnið er kent í Gaither høpi, og tað í sær sjálvum sigur, at her er talan um góðsku. The Isaacs er familjubólkur, ið spælir og sameinir veruligt blue-grass við gospel og country. Bólkurin hevur eini 30 útgávur á baki**

FJARÐAFESTIVALUR 08
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í mong, mong ár hava The Isaacs ferðast og hava eisini nógvar útgávur á baki. Tey hava roynt og blandað saman blue-grass, gospel og country, men tá teirra útgáva nummar 30 skuldi innspælast, gjørdu tey av at søkja óroyndar leiðir og at vísa, hvat tey veruliga duga til. Og útgávan BIG SKY, ið er tann næsta hjá teimum í Gaither høpi, sigst eisini vera bergtakandi, elektrisk og eitt njótilsi.

## Kent

Føroyingar flestir minnast sendingarnar í sjónvarpinum, har sonevnda Gaither familjan fekk stór gospel nøvn á vitjan og at syngja. At sleppa innar í Gaither kringin boðar frá, at góðskan er sum hon skal.

Og tað er eisini júst góðska, ið eyðkenir familjubólkin The Isaacs.

Vitjar ein t.d. heimasíðu teirra, so eru upptøkur at síggja, har ein fær at vita, hvat ein kann vænta sær.

Og ein skilir, hví hesin bólkurin ikki smæðist við at boða frá, hvat konsertvitjandi kunnu vænta sær.

Bólkurin er ein familja av ómetaliga vælleikandi tónleikarum. Hvørki meira ella minni!

Óivað fer bólkurin at leika okkurt av nýggja tilfarinum av BIG SKY útgávuni. Men hóast gingið verður óroyndar leiðir, sigst, so fjalist ikki, at røturnar eru í country og ikki minst blue-grass tónleikinum.

Og júst hesin tónleikurin hevur verið høgt mettur í Føroyum og hevur enn fjepparar. Hetta einafalda, ið ljóðar so væl og lætt, men sum kunnugt er tað einfalda ofta tað, ið krevur mest, um tað skal nytta nakað.

Og her koma The Isaacs til sín rætt.

## Um kantin

Óivað verður tað spennandi á Fjarðafestivalinum at hoyra hesar úrmælingarnar.

At eyðmerkja bólkin og tónlekin er ikki so lætt, eftir tí, ið er atr finna á netinum, men talan er í øllum førum um ein bólk av glaðum tónleikarum, sum leikandi lætt spæla á palli, og koma langt útum pallkantin, so fjøldin sleppur at liva við, tá guitari, violin, mandolin og onnur ljóðføri leika.

At talan er um bólk við 30 útgávum á baki, sigur eitt sindur, og at bólkurin er við í Gaither høpi er nakað tað sama, sum at hava skjalprógv uppá dygd.

**Bólkurin er ein familja av ómetaliga vælleikandi tónleikarum. Hvørki meira ella minni!**

# T.O.S.



**Bárður á Lakjuni metir, at bólkurin kann hava fjepparar í nógvum aldursbólkum og í nógvum umhvørvum.**

**»Allir tollarar og syndarar hildu seg nær hjá Honum, at hoyra Hann.« Luk. 15.1. Millum annað hetta ørindi í Bíbliuni, er orsøkin til heldur for-vitnisliga navnið hjá bólkinum, Tollarar og syndarar**

FJARÐAFESTIVALUR 08
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

T.O.S. er bólkur úr Eysturoynni, mannaður við fýra leirvíkingum, einum fuglfirðingi og einum glyvramanni. Teir hava spælt saman síðani í marsmánaði, tá Bárður á Lakjuni, sum mest er kendur úr sangbólkinum Salt, tók stig til at mann bólkin.

- Hinir vóru beinanvegin við uppá tað, og vit hava vant umleið eina ferð um vikuna, sigur Bárður á Lakjuni.

Hann greiðir frá, at bólkurin ikki er stovnaður til Fjarðafestivalin, men hann heldur tað vera eitt gott tiltak at arbeiða framímóti. Víðari sigur hann, at tað heldur var tilfarið, hann lá inni við, sum hann vildi nýta til okkurt.

## Álvarlig klokkuspøl og klarinettir

Bólkurin nýtir nøkur heldur óvanlig ljóðføri í popprokki, sum er tað nærmasta Bárður á Lakjuni, kann koma til eina lýsing av tónleikinum bólkurin spælir. Umframt gittarar, trummur, bass, sang og ljómborð, nýtir bólkurin eisini klokkuspæl, klarinett og floytu.

Tónleikurin hjá bólkinum er nógv í valstakt, og íblásturin til tekstirnar er í høvuðsheitum funnin í Sálmunum og orðum Jesusar.

- Alt vit spæla er í moll, men summi av løgunum kunnu vónandi fáa fólk at smílast. Tó er tað so, at álvari altíð er í tekstunum, sum ikki eru lovsangir, men altíð er ein boðskapur. Júst sum í øllum øðrum tónleiki, sigur Bárður á Lakjuni.

## Røkka víða

Bárður á Lakjuni metir, at bólkurin kann hava fjepparar í nógvum aldursbólkum og í nógvum umhvørvum. Hann dugir eisini væl at ímynda sær, at bólkurin spældi til fleiri ymisk tiltøk, ikki bara andalig.

- Kemur onkur seriøs konsert og biður okkum spæla, so gera vit tað nokk, men til dans høvdu vit nokk ikki tíma at spælt. Tá lurta fólkini nóg illa at tónleikinum allíkavæl.

## Onki reyp

T.O.S. vilja ikki ordiliga breggja sær av sínum royndum, hóast teir flestu hava spælt nógv, t.d. í bólkinum Visible Fish.

- Ikki reypa ov nógv um okkum, vit vilja bara hava fólkini at koma at lurta eftir okkum, so kunnu tey sjálvi avgera, hvat fyri tónleik vit spæla, og um teimum dáma tað, tey hoyra, leggur Bárður á Lakjuni dent á.

Limirnir í bólkinum eru frá 27 til 34 ára gamlir, nakrir teirra hava familjur, og eina rúgvu av børnum, sum Bárður á Lakjuni nevnir tað.

- Konan plagar at flenna at okkum, tí vit eru so gamlir at byrja ein bólk, men tíbetur flennir hon bara at okkum, heldur enn at missa tolið, sigur orð- og lagskrivarin í bólkinum, sum heldur seg at Jesusi.